FØROYA
NÁTTÚRU- &
UMHVØRVISFELAG



STRIKIÐ IKKI MVG Á BRENNIEVNI TIL BILAR

HVUSSU BRÚKA VIT ALMENNAR PENGAR Í GRØNA ORKUSKIFTINUM – OG HVUSSU VIT FÁA MEST MØGULIGT BURTURÚR?

HVUSSU ALMENNIR PENGAR VERÐA BRÚKTIR

Seinastu 8 árini hevur landið valt at stuðla keypi av elbilum. Hetta hevur kostað landskassanum 159 miliónir krónur, svarandi til uml. 20 miliónir krónur um árið. Úrslitið er, at tað í dag eru 3231 elbilar í Føroyum.

Nú ætla vit at brúka 20 miliónir til at stuðla keyp av dálkandi bensin og diesel í tríggjar mánaðir.

At skifta kós, tá mann hevur sett sær eitt mál fyri og er í ferð við at taka fetini fram móti málinum, tað bara órógvar. FNU heldur, tað verða stórt spell og ikki minst stórt spill av hjarttjentum skattakrónum, at landið ætlar at órógva kósina fram móti grøna orkuskiftinum.

Heldur enn at brúka svørt átøk at gera gerandisdagin bíligari, eiga vit at brúka grøn átøk, sum eisini muna betur og raka rættari.

FØROYA NÁTTÚRU- & UMHVØRVISFELAG

HVØR FÆR ÁGÓÐAN?

Hesar tríggjar mánaðirnar eru nógv ferðafólk í Føroyum. Skal landskassin brúka milliónir av harttjentum skattakrónum til at geva ferðafólkum 25% í avsláttri, tá tey fara í Magn ella Effo at keypa dálkandi bensin og diesel?

FØROYA
NÁTTÚRU- &
UMHVØRVISFELAG

EL-BILAR GEVA TÍ EINSTAKA EIN FÍGGJARLIGAN LÆTTA:

Hjálpir landið fólkinum at skifta til el-bil, so hjálpir landið fólkinum at hálvera sínar útreiðslur til ferðing. Við at koyra el-bil sparir tú umleið helvitina í útreiðslum til el - í mun til at koyra við bensin ella diesel.

Hetta er tríggjar ferðir meira, enn tann einstaki sparir við ætlaðu MVG-frítøkuni á bensin og diesel.

GRØN ÁTØK HELDUR ENN SVØRT

FNU mælir politisku skipanini til at halda seg til grønu leiðina, vit longu hava avgjørt at ganga. **Brúkið grøn átøk heldur enn svørt**, nú tit ætla at gera tað lættari hjá teimum, sum eru illa stillað. Tað finnast fleiri grøn átøk, sum spara meira og raka rættari. Her er bara eitt dømi:

- **Gevið teimum, sum tjena minst, frítt ferðakort frá SSL í tríggjar mánaðir.**

Dømi: Ein einligur forsyrgjari, sum býr í Eysturoynni og koyrir til Havnar hvønn dag til arbeiðis, kann í tríggjar mánaðir stilla bilin og koyra frítt við bussinum. Við hesi grønu loysnini sparir tann einstaki fleiri túsund krónur.

Fyrimunir: Hetta kemur teimum, sum veruliga tørva tað, til góðar. Hetta eggjar fólki til at brúka kollektiva ferðslu. Hetta er ikki ein avsláttur til ferðafólk. Við hesum sparir tann einstaki nógv meira. Við hesum halda vit fram á grønu kósini.

FØROYA NÁTTÚRU- & UMHVØRVISFELAG

POLITISK LEIÐSLA GER MUNIN

Í Norra hevur ein greið politisk strategi gjørt fríluftslívið og grønar vanar til ein náttúrligan part av gerandisdegnum.

Hetta er ikki komið av sær sjálvum, men av:

- Greiðum politiskum málum
- Stuðli til feløg
- Kampanjum og góðum umstøðum

FØROYA NÁTTÚRU- & UMHVØRVISFELAG

FNU METIR IKKI HETTA UPPSKOTIÐ VERA SKYNSAMT

Um vit veruliga vilja gera tað bíligari hjá teimum sum eru illa stillað, so kundu vit brúkt 20 milliónir til at latið teimum eitt frítt busskort í 3 mánaðir ella keypt elsúkklur, sum eru fríar at brúka. Soleiðis halda vit fram á tí grønu kósini, sum vit longu hava brúkt hundraðvís av milliónum uppá at fremja - tað er óskynsamt og dýrt at, at landið nú broytir kós við at lata avsláttur til dálkandi bensin og diesel, sum eisini kemur vælstillaðum og ferðafólkum til góðar.

FØROYA NÁTTÚRU- & UMHVØRVISFELAG

TAK

K

FØROYA
NÁTTÚRU- &
UMHVØRVISFELAG